FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 25. januar 2021
J. nr.: 21/00020
Viðgjørt: MM

Svar upp á fyrispurning nr. 52-071/2020 frá Heðini Mortensen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Gomlurætt

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið við havnini á Gomlurætt, tá Sandoyartunnilin er liðugur?

Svar:

Í løtuni verður ein stórur partur av havnini á Gomlurætt nýttur í sambandi við gerð av Sandoyartunlinum. Harumframt verður havnin nýtt til parkering í sambandi við farleiðirnar hjá Strandfaraskip Landsins til Hest/Koltur/Skopun. Eisini verður havnin nýtt til ferðavinnu hjá Rib62 og til sjóflutning av fiskialing hjá Luna.

Tá Sandoyartunnilin opnar verður brúk fyri havnini til nevnda virksemi. Væntandi verður áhugin størri fyri havnini tá Sandoyartunnilin er komin longur, tí nógvir møguleikar eru á økinum. Í núverandi løtu eru tó ongar ítøkiligar ætlanir við havnini, men málið verður tikið upp politiskt, tá tunnilin er komin longur ávegis.

Tinganes, 25. januar 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum